# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Býtisbarn ella frælsisbræv

Tað var ein sera áhugaverdur og hugvekjandi temadagur, sum okkara starvsbrøður í Sortudýki borðreiddu við í gjár, tá heimastýrislógin gjørdist seksti ár. Tey seksti árini við heimastýri sambært lógini frá 1. apríl 1948 vórðu lýst og viðgjørd frá sera nógvum síðum og vinklum. Settir vórðu nógvir viðkomandi spurningar. Nógvir vórðu svaraðir og eins nógvir standa eftir ósvaraðir. Tað vil so vera í einum máli, sum er so politiskt og vekir so sterkar kenslur hjá flestøllum føroyingum. Her vóru nógv áhugaverd og viðkomandi evni umrødd: fólkaatkvøðan 1946, ríkisstuðulin, politiskar, mentanarligar, sosialar og búskaparligar avleiðingar av heimastýrisskipanini o.m.a.

Tann stóri spurningrin, sum gekk aftur og aftur, var hvørt heimastýrisskipanin hevur verið fremjandi ella darvandi fyri føroyska menning og føroyskt sjálvræði. Hetta orðaskiftið vísti, hvussu djúpar gjáirnar kunnu vera í føroyskum politikki. Her vóru ríkisfelagsflokkarnir, sum síggja heimastýri og ríkisfelagsskap sum fortreytir fyri tí tjóðskaparligu, politisku, búskapaparligu/vinnjuligu, útbúgvingarligu, samferðsluligu og sosialu menning, sum veruliga hevur verið hesi seinastu seksti árini. Hinumegin standa tveir stórir flokkar, har annar sigur hesa menning stava frá initiativríkum og dugnaligum vinnulívsfólki, meðan hin sigur, at menningin er komin hóast darvandi heimastýri og vildi hon verið nógv størri, um eingin blokkur og einki politisk høft vóru.

Eftir stendur spurningurin, hvussu koma vit víðari við eini so spjaddari flokkspolitiskari skipan? Er nøkur vón um eina breiða tjóðskaparsemju í hesum máli, sum enn sum áður setur sín sterka dám á føroyskan politikk? Hetta velst um, hvat, ið ein slíkan dag er retorikkur og tað sum í roynd og veru er realpolitiskt møguligt. Tað tóktist sum retorikkurin hjá øllum er niðurtónaður og tann, sum lurtaði væl, legði til merkis, at allir flokkar hava flutt seg og tykjast vera sinnaðir at troyta teir møguleikar, sum heimastýrislóg, yvirtøkulóg og uttanríkispolitisk heimildarlóg bjóða. Nógv bendir á, at eitt nú loysingarflokkarnir hóast retorikkin eru sinnaðir at royna hesa leið og so lata fullveldismálið standa sína roynd, tann dag, ið allir møguleikar í yvirtøkulógini eru troyttir. Henda kós hóskar væl til ta støðu, sum danska stjórnin hevur, har forsætisráðharrin í gjár klárt meldaði út, at yvirtøkulógin er tað longsta danir fara. Ynskir føroyska tjóðin meira, merkir hetta loysing. Er henda meting á leið, gerast í framtíðini heimastýrislógin og við henni yvirtøkulógin, tey frælsisbrøv, sum slóðaðu fyri einum suverenum og sjálvstøðugum Føroyum - býtisbarnið verður kanska umbroytt til yndisbarnið hjá øllum politiskum flokkum.

**Sosialurin**

## Løgmaður rennur undan ábyrgd

**ZACHARIAS BECH**
Porkeri

Eftir tíðindum, sum útvarpið hevur borið fram, skal løgmaður, Jóannes Eidesgaard, hava heitt á sínar landsstýrismenn, um at leggja øll síni persónligu viðurskifti alment fram.

Hann hevur eisini, ífylgi somu tíðindum, heitt á løgtingsformannin, um at gera tað sama viðvíkjandi løgtingsmonnunum.

Hetta sum fylgja av einum fyrispurningi frá løgtingsmanni til løgmann, um at kanna nøkur viðurskifti hjá Torbjørn Jacobsen, landsstýrismanni, har hesin skal hava keypt partabrøv fyri undirprís burturúr einum partafelagið, sum hann sjálvur átti.

At biðja løgtingsformannin heita á tingmenn um at leggja øll síni privatu áhugamál fram alment, dugi eg ikki at síggja at løgmaður hevur nakran sum helst rætt til. Tingmenn eru fólkavaldir og eiga sum sovornir, ikki at standa til svars yvir fyri løgmanni, men einans yvir fyri sínum veljarum. Longur er tann søgan ikki.

Landsstýrismenn harafturímóti vera settir í starv og loystir úr starvi av løgmanni. Hesin hevur síðan sum tann einasti ábyrgd av at teir landsstýrismenn, sum hann hevur sett, røkja starvið til fulnar.

Vit eiga at hava tað álit á løgmanni, at hann, áðrenn hann setir landsstýrismenn, hevur kannað fult út um teir eru stovureinir. Teirra privatu viðurskifti skulu tí ikki leggjast út fyri almenningin, men einans út fyri løgmann, sum síðan ger sínar metingar um persónin.

Kemur síðan nakað fram, eftir at teir eru settir, sum teir við vilja hava krógva fyri løgmanni, og sum, um hesar upplýsingar høvdu verið komnir fram áðrenn, høvdu gjørt, at viðkomandi ikki hevði verið settur í starv, eigur hamarin at falla.

At løgmaður nú kemur við áheitan á landsstýrismenn um at leggja øll síni privatu viðurskifti fram alment, kundi títt uppá, at hann, áðrenn hann hevur útnevnt hesar, ikki hevur gjørt sítt arbeiði til lítar og samstundis ein roynd at sleppa av við ein part av tí ábyrgd, sum hann einsamallur eigur.

**PS.** At løgmaður í panikk setti ein landsstýrismann í starv einans 10 min. eftir at hann hevði fingið at vita, hvør hesin persónur var, og tí ongan møguleika hevði fyri at kannað viðkomandi, einans av ótta fyri at kunna missa løgmanssessin, er ein onnur søga.

## Seksti ár við einavaldsheimastýri

**JOHN ÍSHEIM**
Føroyskt Fólkaræði

1. apríl 1948 varð einavaldið í Føroyum umskipað við lóg um heimastýri Føroya.

Í mong ár hava danatrúgvir einavaldsmenn roynt at hildið uppi danskari lygn um, at Føroyar skulu vera partur av danska ríkinum, men teir hava ongantíð megnað at víst á, nær og hvussu Føroyar eru vorðnar partur av hesum ríki! Í 1946 valdu teir at bera fram danskt uppskot um innliming og heimastýri. Tíbetur eydnaðist táverandi frælsisrørslu at fella danska uppskotið. Bert 47% av teimum, ið vóru á vali 14. september 1946, tóku undir við heimastýri og innliming í danska ríkið, tað svaraði til góð 30% av teimum, ið høvdu valrætt í Føroyum tá!

Sagt verður at fólkaatkvøðan í 1946 endaði við heimastýrislógini í 1948, ja ódemokratiskt er tað so! Danatrúgvir einavaldsmenn, ið ikki vildu viðurkenna ósigurin, fingu tvíríkjakong okkara og dana at senda løgtingið til hús í 1946 og um- ella endurskipa einavaldið við heimastýrislógini í 1948.

Føroyingar hava ongantíð viðurkent heimastýri ella innliming í danska ríkið og mugu tí halda seg til henda veruleika! Hvussu ofta danska lygnin verður endurtikin, so verður hon ongantíð til veruleika.

Nýskipanir Gorbatjovs vóru í veruleikanum byrjanin til fall sovjetkommunismunnar. Eins og Gorbatjov boðaði frá nýggjum politikki í eystri, hava fleiri flokkar boðað frá nýggjum politikki í Føroyum, fólkið skal tala. Stjórnarskipanarlóg, ES-limaskapur og ríkjasamband við danska ríkið skulu eftir ætlan til fólkaatkvøðu komandi árini. Vónandi føra hesar ætlanir til fall einavaldsins í Føroyum.

Tað er løgið, at sonevndir fullveldismenn ongantíð megnaðu at seta seg veruliga inn í stjórnarstøðu Føroya. Teir fóru til Danmarkar í óðum verkum og ætlaðu at lima Føroyar úr danska ríkinum. Fulltrúi vesturnorska einavaldsins (danski forsætisráðharrin) kundi ikki annað enn vísa hesum óvitum durafjórðingin, ongin kann fara úr nøkrum, sum hann ikki er í ella partur av!

Vit hava nú fingið ein landsstýrismann í uttanríkjamálum, løgmaður tekur sær framvegis av sambandinum við Danmørk. Og enn hava vit ein uttanríkisráðharra, sum eisini er danskur uttanríkisráðharri. Tá hann fer út um ríkjafelagsskapin at umboða okkum og danir er tí rættast at nevna hann uttanríkjaráðharra Danmarkar og Føroya. Londini eru jú tvey ríki í ríkjafelagsskapi. Tað er óivað ringt at skilja hjá óvitum, ið eru aldir upp í donsku trúnni!

Danir stýra Føroyum í dag á sama hátt, sum teir stýrdu Noregi til 1814 og Íslandi til 1918, t.e. við norskum einavaldi! Alt vald í og yvir Føroyum byggir á einavaldssamtykt føroyinga í 1662, tíðin er komin at taka hana av og skipa Føroyar sum demokratiskt land við ella uttan ríkjasamband.

Gevið gætur: Eingin "ríkisfelagsskapur" er til, einki ríki kann vera í felagsskapi við sær sjálvum, men tvey ella fleiri ríki(r) kunnu vera í ríkjafelagsskapi!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.